# B71 vann 3. deild

Leygardagin eydnaðist B71 at vinna finaludystin í 3. deild. Dysturin var móti B36, sum telur fleiri veteranar, sum áður hava gjørt um seg í fremstu røð. Hjá B71 var talan um eitt rættiliga ungt lið, har æviga ungi Eli Hentze virkaði sum stýrimaður, og har einstakir aðrir veteranar eisini gjørdu sítt til at stabilisera spælið. Stutt fyri steðgin kom B71 á odda, tá Eli Hentze sendi brotsspark í netið. Djóni Nolsøe Joensen hjá B36 gjørdi honum tó kynstrið eftir, og løtu seinni stútaði sami Djóni B36 upp á 2-1. Men so tóktist orkan ganga undan. Jón Koytu Petersen skoraði tvey frálík mál, og tá B36 royndi at spenna álopsbogan seinastu løtuna, kundi Ebbe Kristin Thomsen staðfesta sigurin.



# Agger vil ikki tosa um sáttmála

Danski verjuspælarin Daniel Agger er ikki sinnaður at tosa við Liverpool um at leingja sín sáttmála. Eftir drúgvan skaða farna kappingarár, hevur Agger ikki vunnið sær pláss aftur á liðnum í hesum kappingarárinum. Liverpool er sinnað at leingja sáttmálan, men Agger vil leita sær eftir nýggjum felag longu um ársskiftið, um støðan hjá honum í felagnum ikki broytist.



*Mortan Hansen, sum her langar bóltin fram við Rógva Weyhe, var væl fyri, tá StÍF í fyrsta dystinum hetta kappingarárið vann sær tvey stig í Kollafirði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KÍF-StÍF 21-24 (11-12):

# StÍF tók alt í Kollafirði

**Kollfirðingar megnaðu ikki at halda fast í StÍF, sum vitjaði sunnukvøldið**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast StÍF seinnu árini støðugt hevur verið partur av føroyska hondbóltsoddinum, so er ivasamt, hvussu styrkin á liðnum er í løtuni.

Tí skuldi tað als ikki takast fyri givið, at teir skuldu hava øll stigini frá KÍF, sum í fjør gjørdist aftasta liðið í manshondbólti, men sum samstundis ongantíð gevur upp, fyrr enn dómarin hevur bríkslað fyri seinastu ferð.

Og talan gjørdist eisini um sera trupla uppgávu hjá StÍF. Fyri steðgin gekk mest sum púrasta javnt fyri seg, og beint eftir steðgin vóru tað vertirnir, sum hóttu við at fara avstað. Tað var tó skjótt, at StÍF svaraði aftur, og eftir at teir broytt 13-12 til 17-20, var eingin vegur aftur hjá KÍF.

Við sigrinum syrgdu strandingar fyri, at teir løgdu væl frá landi í ársins útgávu av hondbóltslands kappingini. Men um hetta aftur í ár fer at røkka til finalusess, er ein heilt annar spurningur.

## FAKTA um dystin

**KÍF-StÍF 21-24 (11-12):**
10 min: 3-6
20 min: 8-10
40 min: 15-15
50 min: 18-21
**Málskjúttar KÍF:** Damir Oros 6(1), Rógvi Weyhe 4, Niklas Reginsson 3, Teitur Joensen 2, Suni Johannesen 2, Tony Weyhe 2, Regin Petersen 1, Ási Dam 1
**StÍF:** Mortan Hansen 7, Rúni Johansen 6(2), Bárður B. Danielsen 4, André F. Danielsen 3, Leivur Justinussen 2, Alexandur Johansen 1, Rúni Niclasen 1
**Brotskøst:** KÍF 2, StÍF 3
**Útvísingar:** KÍF 6, StÍF 2

Kyndil-H71 21-35 (8-16):

# Ójøvn grannauppgerð

**H71 hølvaði Kyndil av, tá teir grønu í ársins fyrsta dysti góvu til kennar, at Kyndil neyvan verður partur av oddastríðnum í ár**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kyndil er mest vinnandi føroyska felagið, og sum so eru vónirnar til liðið altíð stórar.

Í vetur er tó ikki líkt til, at Kyndil skal gera tær heilt stóru skreytirnar. Manningarliga er liðið als ikki so væl fyri, sum teir onkra aðra tíð hava verið, og tí vóru menn sum Erlendur Johannesen, Bárður Johannesen og Jónleif Sólsker at síggja á liðnum, sum sunnudagin royndi seg móti H71.

Og hoyvíkingarnir sýndu onga náði í sínum avriki. Longu fyrstu fáu minuttirnar skræddu teir seg avstað, og teir grønu vóru ongan tíð í nær námind møguleikanum at skapa nakað av spenningi í dystinum.

Tvørtur ímóti var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin hjá hoyvíkingunum skuldi verða. Ikki minst, tá hugsað verður um, hvussu nógv meira orka býr í liðnum av ungum hoyvíkingum.

Við trivaliga sigrinum sendi H71 tekin um, at teir aftur í ár skulu takast í álvara, meðan tað hjá Kyndli tykist vera ein spurningur um at sleppa sum best ígjøgnum kappingarárið. Eisin hóast tað kann roknast við, at aðrir spælarar leggjast afturat hópinum, so hvørt sum árið líður.



*Hoyvíkingar sýndu ongan náði, tá teir vundu burtur úr einum Kyndils-liði, sum í løtuni er langt frá vanligari Kyndils-styrki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA um dystin

**Kyndil-H71 21-35 (8-16)**
10 min: 1-6
20 min: 4-12
40 min: 13-23
50 min: 16-32
**Málskjúttar Kyndil:** Bárður Johannesen 8(1), Hans Áki Dal-Christiansen 3, Thorvald Abrahamsen 2, Jónleif Sólsker 2(1), Rani Ellingsgaard 2, Janus Einar Sørensen 1, Hans Arni B. Thomsen 1, Rói H. Lamhauge 1, Tummas Pauli Hanusarson 1
**Brotskøst:** H71 2, Kyndil 5
**Útvísingar:** Kyndil 3, H71 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

VÍF-Neistin 34-28 (18-14):

# Gulir og bláir meistarar

**VÍF smurdi Neistan av, tá føroyameistararnir og FM-favorittarnir vitjaðu í fyrsta umfarinum**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum verjandi meistarar er Neistin eitt av bestu boðunum upp á ein komandi FM-vinnara. Liðið tykist ikki viknað í mun til í fjør, og móti einum VÍF-liði, sum framvegis skal byggjast upp, skuldu teir bláu roknast sum favorittar.

Men á vøllinum gongur ikki altíð, sum prestur prædikar. Tí tað var nevnliga VÍF, sum kannaði sær stígini, tá liðini hittust í Vestmanna sunnudagin.

Fyrstu løtuna var annars ikki so nógv, sum skilti partarnar, men vestmenningar høvdu kortini hug at fara undan. Miðskeiðis í hálvleikinum høktu teir eisini munin upp í trý mál, og hóast Neistin svaraði aftur, so kostaði hetta nógvar kreftir. Og seinastu løtuna undan steðginum gekk heilt galið. Neistin hevði annars vunnið seg framum, men seks VÍF-mál á rað syrgdu fyri, at teir gulu nú vóru omaná.

Og í løtuni eftir steðgin var gongdin tann sama. VÍF vann seg átta mál framum, og so stóð teimum flestu greitt, at stigini ikki skuldu nakran veg á degnum. Neistin royndi at spruttа aftur seinastu løtuna, men talan var bert um eina roynd at pynta um úrslitið av dystinum, sum VÍF altso vann trygt.

## FAKTA um dystin

**VÍF-Neistin 34-28 (18-14)**
10 min: 6-5
20 min: 11-12
40 min: 23-16
50 min: 28-22
**Málskjúttar VÍF:** Joen P. Høgnesen 8, Sámal Joensen 6, Agnar Joensen 4(2), Karl J. Djurhuus 4, Áki G. Olsen 3, John Zachariassen 2, Rúni Joensen 2, Niels Andreasen 2, Jákup S. Andreasen 2, Áki Olsen 1
**Neistin:** Finnur Hansson 8, Blagoje Buha 5(2), Jugoslav Djumic 5, Ingi Olsen 3, Bogi Berg 2, Jens Mohr 2, Jón Ludvík 1, Áki Mørk 1, Tróndur Kragesteen 1
**Brotskøst:** VÍF 2, Neistin 3
**Útvísingar:** VÍF 1, Neistin 6
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Hans Thomassen & Hanus Kúrberg